# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vit sóu ein dimman blett á ísinum. Tá vit komu hagar, var tað Lenin, og tað kom óvart á okkum*

*(bretskur Antarktis-fari)*

# Ætlaðu sær til USA at fremja yvirgang

**Millum 10 og 20 limir í al-Qaeda ætlaðu sær til USA sum lesandi, men ørindini vóru at fremja yvirgang á amerikanskari jørð**

Tað vóru limir í iraksku deildini hjá al-Qaeda, sum høvdu lagt ætlanina, men hon bleiv avdúkað, tá amerikanskir hermenn rannsakaðu eini hús seinasta summar. Í pappírum, sum hermenninir funnu, vóru fleiri ætlanir um álop á mál í USA.

Sambært sjónmvarpinum ABC News vórðu pappírini handað herleiðsluni í Irak, men bara teir ovastu leiðararnir har og í Washington fingu nakað at vita um innihaldið. Eftir tí, sum nú er likið út, skuldu millum 10 og 20 limir í al-Qaeda fara til USA sum lesandi.

Lærdu háskúlarnir í USA hava fingið strong boð um at halda eit vakið eyga við útlendskum lesandi, sum ongantíð koma fram, ella sum hava ilt við at møta til undirvísing. Í august í fjør høvdu ellivu egyptiskir studentar fingið pláss á einum lærdum háskúla í Montana. Tað vísti seg, at teir vóru komnir til USA, men tá teir ikki komu til undirvísingina, fór løgreglan at leita eftir teimum og handtók tey.

Pappírini, sum vórðu funnin í Irak, vórðu funnin um somu tíð, sum leiðarin hjá al-Qaeda í Irak, Abu Musab al-Zarqawi, bleiv skotin, og ABC News veit at siga, at menninir, sum skuldu til USA, høvdu tilknýti til al-Zarqawi.

Sambært ABC News er einki, sum bendir á, at nakar av monnunum varin farin til USA, áðrenn ætlanin bleiv avdúkað.

# Skuldsettur fyri 26 morð



*Robert William Pickton*

**Síðani 1983 eru umleið 60 kvinnur horvnar í kanadiska býnum Vancouver. Nú er ein maður skuldsettur fyri at hava beint fyri 26 teirra**

Tann 57 ára gamli Robert William Pickton er skuldsettur fyri at hava beint fyri 26 kvinnum, sum hvurvu í Vancouver síðst í nítiárunum. Tær flestu vóru skøkjur ella rúsevnamisnýtarar.

Robert William Pickton var bóndi og búði beint uttan fyri býin. Í 2002 fekk løgreglan illgruna um, at hann hevði beint fyri tveimum kvinnum. Løgreglan gjørdi av at leita við gravimaskinum, og tá liðugt var at leita, vóru gravimaskinurnar komnar fram á líkini av 26 kvinnum, sum lógu jarðaðar tætt við húsini. Kortini hevur bóndin noktað seg sekan.

Dómarin í rættinum í Vancouver, James Williams, ávaraði í gjár nevningarnar um, at teir koma at hoyra frásagnir og at síggja myndir, sum bara finnast í ræðufilmum.

– Tann einasti munurin er, at heima við hús kunnu tit sløkkja sjónvarpið, um myndirnar gerast ov ræðandi. Tað kunnu tit ikki her, segði dómarin. AP skrivar, at nøkur tíðindafólk, sum hava fylgt við málinum, hava fingið slíkan skelk, at tey hava verið noydd at leita sær hjálp frá sálarfrøðingum.

Løgreglan ber ótta fyri, at onkur kann finna uppá at gera seg inn á Robert William Pickton undir rættarmálinum, og tí skal hann sita í einum skottryggum glaskliva inni í rættarhølinum.

Í fyrra umfari er tann 57 ára gamli bóndin skuldsettur fyri seks morð. Hini 20 koma aftaná, sigur ákæruvaldið. Verður hann dømdur sekur í øllum málunum, er Robert William Pickton tann ringasti hópdrápsmaðurin í kanadisku søguni.

## STUTT SAGT

### Einki trýst

Týsku myndugleikarnir aftra seg við at gera eftir boðunum frá danska ákæruvaldinum, sum vil hava fatur á fyrrverandi danska SS-manninum Søren Kam, sum býr í Týsklandi, og sum er skuldsettur fyri at hava verið við til at beina fyri einum donskum blaðstjóra undir seinna heimsbardaga. Danski Fólkaflokkurin vil nú hava løgmálaráðharran, Lene Espersen, at leggja trýst á týskarar, men tað vil hon ikki. Tann 85 ára gamli Søren Kam er týskur ríkisborgari, men kann sambært ES-reglum sendast til Danmarkar til rættarsókn.

### Lenin í Antarktis

Eitt bretskt-kanadiskt ferðalið kom um vikuskiftið fram á eina standmynd av Lenin langt inni á ísinum í Antarktis. Standmyndin stóð á einum 3.725 metrar høgum fjalli, sum er 879 kilometrar frá sjálvum Suðurpólinum. Tað vísti seg, at eitt russiskt rannsóknarlið hevði verið har í 1958, og at russararnir høvdu havt eina standmynd av Lenin við sær og sett hana upp á fjallinum. Har hevur hon staðið síðani, og har stendur hon enn, skrivar BBC.

### Færri sjórán

Ein uppgerð hjá altjóða sjóferðsluskrivstovuni IMB vísir, at í fjør vóru 239 skip fyri sjóráni, og tað er tað minsta talið seinastu átta árini. Í 2005 vóru sjóanini 276 í tali, og í 2004 vóru tey 329. IMB sigur, at tey flestu sjóránini eru framvegis í indonesiskum sjóøki, har sjóræanarar lupu á 50 skip í fjør, og skrivstovan mælir sjófólki til at vera á varðhaldi, tá tey sigla har á leiðini. Tølini hjá IMB vísa eisini, at tey flestu skipini verða álopin, meðan tey liggja fyri akkeri.